# Byrjaði á dekkinum –

**Eftir at hava vitjað Suðuroynna um vikuskiftið, legði trúboðaraskipið Logos II leiðina til Íslands í gjár. – Tað var ein serstøk kensla at koma inn í føroyskt sjóøki og leggja at í føroyskari havn, sigur stýrimaðurin umborð, Trúgvi Petersen sum er ættaður úr Gøtu.**




*- Tað er sera flott at tey í samkomuni Kelduni eisini vilja standa aftanfyri okkum, sigur Trúgvi Petersen*

TRÚBOÐARASKIP
*Orð & myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tvøroyri: Tað er ein øgiliga rokan av fólki her í stóru bókasøluni umborð. Onkur hyggur eftir leikum, onkur annar eftir bókum, meðan ein stórur partur er í teirri deildini har fløgurnar eru at finna.

Við 5000 ymiskum titlum er bókasølan á Logos II helst tann størsta her á landi. Og tí er lítil ivi um, at fólk munnu finna tað tey leita eftir – og helst meiri enn tað.

Eingin ivi er um, at vitjanin hjá hesum trúboðaraskipinum er eitt kærkomið høvi hjá suðuroyingum og øðrum at fáa kunnleika til eitt slag av missiónsarbeiði, har kristiligar bókmentir spæla ein avgjørdan leiklut.

Aftanfyri skipið stendur missiónsfelagsskapurin Operation Mobilisation. Aftanfyri henda stendur skiparin umborð. Og undir honum aftur stendur føroyski stýrimaðurin, hin 32 ára gamli Trúgvi Petersen.

Hann hevur longu drúgvar royndir umborð á skipinum, og verður umborð til nakað út á heystið, tá hann fer í land eitt stutt skifti.

- Vit ætla okkum at vera við felagsskapinum í eini tvey ár aftrat. Vit gleða okkum at fara við Logos Hope, tá tað skipið verður klárt í næstum.

- Jú, tað verður spennandi at sleppa umborð á gomlu Norrønu, sum nú er umbygd til eitt nútíðar trúboðaraskip, sigur Trúgvi í samrøðu við Sosialinum.

## Nú er tað tín túrur!

Áðrenn Trúgvi nakrantíð kom í samband við OM, hevði hann hoyrt nógv um henda felagsskapin frá ungdóminum í samkomuni, har hann gekk.

Hann var nógv við til ungdómsmøtini hjá Brøðrasamkomunum í Eysturoynni, millum annað í Gøtu, Leirvík, Fuglafirði og á Toftum. Her var javnan vitjan av ungfólkum, sum søgdu frá øllum tí spennandi, tey høvdu upplivað umborð á skipunum og í landi.

- Eg kann serliga minnast tað eina kvøldið, tá Símun Jóanesarson greiddi frá sínum upplivingum umborð á hinum trúboðaraskipinum hjá felagsskapinum, Doulos.

- Hann dugdi væl at siga frá og vísti myndir. Og satt at siga, føldi eg tá eitt kall at fara út tænastu. Tað kom líkasum til mín: "Trúgvi, nú er tað tín túrur. Tak tú nú títt tørn!", greiðir Trúgvi siðiliga frá. Sum sagt, so gjørt.

## Andaliga og tað fakliga

Trúgvi mynstraði umborð, og var eitt skifti við sum dekkari. Meðan hann arbeiddi her, fekk hann eyguni upp fyri einum heilt øðrum møguleika umborð.

- Ja, eg byrjaði sum dekkari. Tað var meðan eg arbeiddi her, at eg sá at tørvur eisini var á stýrimonnum. Hetta var somuleiðis nakað fyri meg.

- Á henda hátt kundi eg kombinera tað fakliga við tað andaliga, - at kunna knýta áhugan fyri missiónsarbeiði við áhugamálini fyri sjógvinum, sigur hann, og leggur síðani aftrat við einum brosi: - Hetta var kanska ein løgin máti at byrja sjólívið uppá, at fara sín fyrsta túr til skips við einum trúboðaraskipi!

Trúgvi gjørdi ikki mætari enn at fara aftur á skúlabonk, og hevur í hesum umfarinum verið stýrimaður umborð á Logos II í sløk tvey ár.

## Tey ungu mennast

Trúgvi hevur íalt verið við OM í fýra og eitt hálvt ár. Men hann hevur ongar ætlanir um gevast enn á sinni.

- At eg havi verið við øll hesi árini og framvegis ætli mær tað, er tí at ein sær, at tað hendir veruliga nakað við øllum teimum fólkunum sum koma umborð, greiðir stýrimaðurin frá.

Tey umborð leggja merki til, at tá tey ungu koma umborð, eru tey heldur óbúgvin, eru ofta júst liðug við skúlagongdina og eru haraftrat kanska vorðin frelst stutt frammanundan.

- Men tá tey hava verið við skipinum eina tíð, sær ein týðiliga at tey búnast, bæði persónliga og ikki minst andaliga.

Túsundtals ungfólk hava gjøgnum árini verið við OM. Tá fólkini í felagsskapinum hyggja aftur í tíðina, duga tey væl at síggja, at eitt tíðarskeið við felagsskapinum hevur havt avgerandi týdning fyri mong menniskju. Tað hevur mangan verið sum eitt springbretti hjá teimum at fara víðari í missiónsarbeiðinum.

- Nógv teirra eru í dag úti í missión, summi virka sum samkomuleiðarar og uppaftur onnur arbeiða við bíbliutýðingum kring allan heimin.

- Jú, tað er sera áhugavert og gleðiligt at síggja, hvussu ein soleiðis kann gera eina góða íløgu í eitt trúgvandi menniskja.

## Standa aftanfyri

Tá fólk fara út í missiónsarbeiði eru ymiskir hættir, hvussu hesi verða stuðlað. Summi fáa fasta løn frá eini missiónsrørslu, meðan ein í øðrum førum hevur samkomur sum standa aftanfyri seg.

Trúgvi og familja hansara eru stuðlað av samkomuni Kelduni í Skálafirði, umframt familja og vinir.

- Hesi standa øll aftanfyri okkum í bøn og við fíggjarligum stuðli. Og tú kanst ætla, at vit eru sera fegin og takksom fyri hetta.

- Tað er ómetaliga flott, at tey í samkomuni vilja strekkja seg til eisini at stuðla okkum. Slíkur stuðul be-